UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsveg 3
100 Tórshavn

Dagfesting: **1. februar 2021**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 19/00017-115**

Svar

upp á

fyrispurning nr. 52-073/2021 frá Beintu Løve Jacobsen, løgtingsmanni, eftir Tingskipanini § 52 a. Fyrispurningur um ensk tíðindi hjá KVF, settur landsstýrismanninum við uttanríkis- og mentamálum, Jenisi av Rana (at svara skrivliga eftir TS § 52 a).

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvørjar eru ætlaninar hjá Kringvarpi Føroya við tíðindaflutninginum á enskum?
2. Hvat kostar skipanin við tíðindum á enskum?

Svar

Til 1: Eg havi spurt Kringvarpið um ætlanirnar hjá stovninum við tíðindaflutninginum á enskum, og eg seti svarið inn her:

”Kringvarp Føroya hevur hildið seg til public service-sáttmálan, har tað stendur, at stovnurin “skal virka við til at framleiða upplýsandi public service-tilfar, ið vendir sær til tilflytarar, ið ikki skilja føroyskt ella skandinaviskt”. Hesa tænastuna hevur stovnurin veitt gjøgnum “News in English” á heimasíðuni kvf.fo.

Public service-sáttmálin fór úr gildi á nýggjárinum, men tað verður framvegis arbeitt sambært høvuðsleistinum í sáttmálanum, til ein nýggjur kemur í gildi.

Kringvarpið hevur innanhýsis umrøtt, um tað er rætt, at ein stovnur, sum framleiðir føroyskt tilfar, eisini skal framleiða tilfar á enskum. Í integratiónsarbeiði verður oftast stórur dentur lagdur á at læra tilflytarar høvuðsmálið í landinum hagar tey flyta. Harnæst kann yvirskipað sigast, at integratións-uppgávur liggja ikki vanliga hjá public service-miðlunum, men hjá eitt nú integratiónsstovnum og kommunum. Um komandi public service-sáttmálin eisini leggur upp til, at Kringvarpið skal framleiða upplýsandi public service-tilfar til tilflytarar, ið ikki skilja føroyskt ella skandinaviskt, fer Kringvarpið at halda fram við tænastuni “News in English” og at menna tænastuna, soleiðis at tíðindini í størri mun verða lagað til tilflytararnar.”

Eg kann leggja aftrat, at Kringvarpið og Uttanríkis- og mentamálaráðið í løtuni samskifta um leistin fyri og innihaldið í einum nýggjum public service-sáttmála. Vit hava eisini í hesum sambandi umrøtt spurningin um framhald av tíðindum á enskum. Eg haldi, at hetta er ein týdningarmikil tænasta at veita okkara borgarum, ið ikki skilja føroyskt, so eg vænti ikki, sum er, at tænastan verður strikað.

UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Til 2: Sambært Kringvarpinum er tænastan í stóran mun útveitt. Frá síðst í desember 2019 til síðst í desember 2020 rindaði Kringvarpið fríyrkisjournalisti 282.800 krónur fyri veitingina. Hartil kemur nakað av innanhýsis kostnaði, sum liggur undir 50.000 krónur.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður

Tinghúsvegur 5-7 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • ✉ ummr@ummr.fo • www.ummr.fo